## Arsenal aftur á odda

Arsenal vann seg aftur á oddasessin í Premier League í strævnu jólaskránni. Hóast teir fingu danska Bendtner riknan av vølli, so vann Arsenal 4-1 á útivølli móti Everton. Ein dystur, sum Arsenal annars hevur tapt tey bæði seinastu kappingarárini.Og tá Manchester United sama dag tapti 2-1 á útivølli móti West Ham, kundi Arsenal smoyggja sær upp á oddasessin.



## Claus skoraði aftur

Tað hevur gingið strúkandi hjá Blackpool seinastu góðu vikuna. Nýggjársdag vann liðið 3-0 móti Burnley, og gav hetta eina úrtøku upp á 10 stig í seinastu fýra dystunum. Claus Bech Jørgensen spældi við frá byrjan í dysitnum móti Burnley, og hann skoraði eisini eitt av málunum. Blackpool hevur stóran part av árinum verið heilt nær niðurflytingarstrikuni, men seinastu vikurnar hevur liðið førkað seg upp á 14. plássið í enska Championship.

# Glóðheitur jólamaður

**Síðani skiftið til Blackburn hevur Roque Santa Cruz brádliga víst evnini, sum í 1999 fekk Bayern München at keypa tá bert 17 ára gamla áleyparan. Í strævnu ensku jólaskránni hevur áleyparin bumbað átta mál inn í seinastu fimm dystunum fyri Blackburn**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Paraguay er kanska ikki heimsins nalvi innan fótbóltsspælið. Men tað vakti ans, tá Santa Cruz fyri knøppum 10 árum síðani spældi sínar fyrstu dystir í fremstu røð. Bara 16 ára gamal spældi hann sínar fyrstu dystir fyri Olimpia Asuncion, og hetta gekk mikið væl. 14 mál í 38 dystum hjálptu væl til hjá felagnum, sum vann meistaraheitið í bæði '98 og '99. Og bert 17 ára gamalur vann Santa Cruz í '99 heiðurin sum ársins spælari.

Tað skapti trupulleikar við arbeiðsloyvinum, tá Bayern München alt fyri eitt vildi hava fatur á einum somikið ungum spælara, men týska felagið fekk tó sín vilja, tá ungi maðurin hevði hildið 18 ára føðingardag, og so mundi hann halda, at eydnan var vunnin.

### Vann ikki fast pláss

Í átta ár við týska stórfelagnum var Santa Cruz við til at vinna fimm bundesligugull, fýra steypasigrar, ein sigur í Champions League og ein sigur í World Club Cup. Men hóast hetta, so var talan ikki um einvísa succés hjá spælaranum. Íalt gjørdist talan bert um 143 dystir, har Santa Cruz skoraði 38 ferðir, og hetta var nú væl minni enn tað, sum hann hevði vónir um, tá stóra skiftið gjørdist veruleiki.

Í Bayern hildu tey seg heldur ikki fáa nóg mikið burtur úr spælaranum. Og tá felagið í summar fekk tilgongd av Luca Toni og Miroslav Klose til álopsplássini, stóð teimum flestu greitt, at framtíðin hjá Santa Cruz ikki var har á leiðini.

Tað gjørdi Mark Hughes sær dælt av. Fyri £ 3,5 mió keypti Blackburn áleyparan, sum í mangar mátar kann sammetast við venjaran. Sum spælari var Hughes ein kropsliga sterkur framherji, sum megnaði væl at halda upp á bóltin, og sjálvur ivaðist Hughes ikki, tá møguleikin beyðst.

- Hann er framvegis ungur, og hann er í altjóða flokki, segði Hughes, tá hann ólavsøkuaftan skrivaði undir fýra ára sáttmála við spælaran, og higar til hevur Santa Cruz væl og virðiliga prógvað rættleikan í hesi útsøgn.

### Glóðheitur

Íroknað steypakappingum, so hevur hann hetta kappingarárið spælt 23 dystir fyri Blackburn, og 14 ferðir hevur hann funnið vegin til meskarnar. Ikki minst hava seinasta vikurnar vakt ans, tí við átta málum í fimm dystum hevur hann verið heitasti maðurin í enskum fótbólti í strævna jólamánaðinum. Og samstundis er Blackburn stillisliga klintrað upp á 9. plássið í Premier League. Ein støða, sum tey í felagnum væl og virðiliga eru nøgd um her og nú.

Og úr einum føroyskum sjónarhorni er tað nú kanska heldur ikki so galið, at Santa Cruz vísir slíka styrki. Tað skuldi í øllum førum ikki gjørt venjingarstøðuna hjá Gunnari Nielsen verri, at hann hevur møguleika at standa modell til skotroyndir hjá einum áleypara, sum í løtuni má roknast millum teir avgjørt bestu.



*Tvey av málunum hjá Santa Cruz komu, tá hann tann 27. desember tryggjaði Blackburn stig í 2-2 javnleikinum á útivølli móti Manchester City*

*Mynd: Polfoto/AP*

## FAKTA

**Roque Santa Cruz**
Føddur 16. August 1981 • 187 cm • 80 kg • Nummar 9
**Spælt fyri:** Olimpia Asuncion ('98-'99), Bayern München ('99-'07), Blackburn Rovers (07-?)
**Vunnið:** Meistari í Paraguay (2), týskur meistari (5), týskur steypavinnar (4), Champions League (1), World Club Cup (1)

**Enska Premier League**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Arsenal | 21 | 15 | - | 5 | - | 1 | 42 | 16 | 26 | 50 |
| 2 | Man Utd. | 21 | 15 | - | 3 | - | 3 | 38 | 11 | 27 | 48 |
| 3 | Chelsea | 21 | 13 | - | 5 | - | 3 | 33 | 16 | 17 | 44 |
| 4 | Liverpool | 19 | 10 | - | 7 | - | 2 | 33 | 12 | 21 | 37 |
| 5 | Everton | 21 | 11 | - | 3 | - | 7 | 37 | 22 | 15 | 36 |
| 6 | Aston Villa | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 37 | 27 | 10 | 36 |
| 7 | Man City | 20 | 10 | - | 6 | - | 4 | 27 | 22 | 5 | 36 |
| 8 | Portsmouth | 21 | 9 | - | 7 | - | 5 | 31 | 20 | 11 | 34 |
| 9 | Blackburn | 20 | 8 | - | 6 | - | 6 | 27 | 28 | -1 | 30 |
| 10 | West Ham | 20 | 8 | - | 5 | - | 7 | 25 | 19 | 6 | 29 |
| 11 | Newcastle | 20 | 7 | - | 5 | - | 8 | 27 | 31 | -4 | 26 |
| 12 | Tottenham | 21 | 6 | - | 6 | - | 9 | 42 | 38 | 4 | 24 |
| 13 | Reading | 21 | 6 | - | 4 | - | 11 | 29 | 44 | -15 | 22 |
| 14 | Middlesbr. | 21 | 5 | - | 5 | - | 11 | 18 | 35 | -17 | 20 |
| 15 | Birmingham | 21 | 5 | - | 4 | - | 12 | 22 | 32 | -10 | 19 |
| 16 | Bolton | 20 | 4 | - | 5 | - | 11 | 22 | 32 | -10 | 17 |
| 17 | Sunderland | 20 | 4 | - | 5 | - | 11 | 20 | 39 | -19 | 17 |
| 18 | Wigan | 20 | 4 | - | 4 | - | 12 | 20 | 36 | -16 | 16 |
| 19 | Fulham | 21 | 2 | - | 9 | - | 10 | 22 | 37 | -15 | 15 |
| 20 | Derby | 20 | 1 | - | 4 | - | 15 | 10 | 45 | -35 | 7 |

## Úrslitini um nýggjárið

| | |
|---|---|
| **29. desember** | |
| Birmingham-Fulham | 1-1 |
| Chelsea-Newcastle | 2-1 |
| Portsmouth-Middlesbrough | 0-1 |
| Sunderland-Bolton | 3-1 |
| Tottenham-Reading | 6-4 |
| West Ham-Man Utd. | 2-1 |
| Wigan-Aston Villa | 1-2 |
| Everton-Arsenal | 1-4 |
| **30. desember** | |
| Derby-Blackburn | 1-2 |
| Man City-Liverpool | 0-0 |
| **1. januar** | |
| Fulham-Chelsea | 1-2 |
| Arsenal-West Ham | 2-0 |
| Man Utd-Birmingham | 1-0 |
| Middlesbrough-Everton | 0-2 |
| Reading-Portsmouth | 0-2 |
| Aston Villa-Tottenham | 2-1 |